## Kommunuskúlin keypt 150 teldur

150 teldur til næmingarnar og teir 60 lærararnir fáa hvør sína. Eisini verða uppvørpur settar upp í skúlastovunum. Tríggir-fýra næmingar vera um hvørja teldu, og við uppvørpunum fær teldan verðið ein aktivur partur av undirvísingini – bæði sum felagsundirvísing og til næmingaframløgur. Hetta stendur skrivað á heimasíðuni hjá Føroya Lærarafelag. Har stendur eisini, at tey í Kommunuskúlanum vóna, at skrivligu royndirnar í føroyskum, donskum og enskum stíli hjá 9. og 10. flokki kunnu skrivast á teldu. – Hetta vónandi til jólaroyndina um eitt ár, skrivar heimasíðan hjá Føroya Lærarafelag.



## Vestanstevna: Go-cart og framsýning

Til stevnuna í Miðvági um vikuskiftið hevur MB útvegað sær níggju Go-cart bilar, sum tey vitjandi kunna royna seg í. Breytir til vaksin og til foreldur við børnum eru úti á Bakka. Miðvingar eru eisini raskir at mála. Fleiri fólk hava gingið á kvøldskúla í vetur og lært at mála. Málningar frá teimum, eins væl og eldri málningar verða at síggja á listaframsýningunum, sum vera í niðaru hædd hjá Jens Eli og í Gamla Skúla.

# Ólavsøkan á hægri støði

**Henda ólavsøkan verður større, longri og betri, staðfestir borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen**



– *Í ár fara vit at flyta ólavsøkuna oman í Miðbýin aftur og skapa eitt lívligt umhvørvið her, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

ÓLAVSØKA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Ein rúgva av nýggjum og spennandi tiltøkum verða í miðbýnum hesa ólavsøkuna. Talan er um tiltøk, sum aftur skulu fáa lív í Vaglið, Tórsgøtu og Vágsbotn. Harafturat byrjar ólavsøkan longu 25. Juli við ólavsøkukonsertini, sum á hesum sinni verður í Tórsgøtu.

- Ætlanin er at steingja Tórsgøtu fyri ferðslu og gera tað soleiðs, at fólk kunnu ganga inn og út úr økinum við Rio Bravo og við Miðlahúsið, sigur Heðin Mortensen.

### Skapa lívligt umhvørvi

Leygardagin 26. Juli verða ymisk nýggj tiltøk á skránni. Millum annað skipar Bátafelagið fyri Dans på Brygga niðri í Vágsbotni, har tað verður livandi tónleikur, møguleiki at keypa sær ein góðan bita, og harafturat verður nýggja Café Vágsbotn eisini opin.

Sunnudagin verður so ikki nakað stórt tiltak, men tá verða tær seinastu fyrireikingarnar til teir báðar heilt stóru dagarnar gjørdar. Smærri tiltøk verða tó henda dagin, og ólavsøkan heldur sostatt áfram.

- Henda dagin fara vit at brúka til at rudda upp og at gera klárt til tað stóra brakið. Ein pallur, nevndur Tórspallur, verður settur upp við norðara enda á høvuðstrappuni á ráðhúsinum, og har verða nógv ymisk tiltøk ólavsøkuaftan og ólavsøkudag, so sum dansur, tónleikur, sangur, skemt og fimleikur. Og sjálvandi kemur hetta at vera ókeypis, leggur borgarstjórin Heðin Mortensen dent á.

Endamálið við øllum hesum er at skapa eitt livandi umhvørvi í miðbýnum, sum skal skapa javnvág í konsentratiónini av tiltøkum.

- Seinastu árini hevur ólavsøkan verið ógvuliga konsentrerað kring kommunuskúlagarðin, og tað hevur verið eitt sindur tómligt í sjálva miðbýnum, og hetta ætla vit nú at broyta, sigur Heðin Mortensen.

### Nógvir pallar

Umframt tann nýggja Tórspallin, verða eisini onnur nýggj høli við ymiskum tiltøkum tikin í nýtslu. Tórshavnar Býráð hevur keypt og renoverað Reinsaríið, og har er eisini ætlanin at hava fleiri tiltøk. Reinsaríið letur upp ólavsøkuaftan, og har verður livandi tónleikur at hoyra báðar ólavsøkudagarnar. Har verða millum annað spennandi nøvn so sum Páll Finnur Páll og Hanus G. Johansen at hoyra. Eisini verður Posthúskjallarin opin, soleiðs at fólk kunnu koma á gátt og fáa ein kaffimunn og hvíla sær beinini. Møguliga verður eisini tónleikur ella okkurt líknandi at hoyra har.

Í tinghúsgarðinum verða markisur og sølubúðir settar upp, og tað sama er galdandi oman eftir Áarvegnum. Endamálið við hesum er at sleppa av við teir eftirhondini slitnu skúrarnar, og at skapa eitt hugnaligt umhvørvi. Í Vágsbotni verður eisini ymiskt sett upp, og har verður eisini lív í alla tíðina.

Harafturat verður eisini Skansin karmur um eitt tiltak, har Undirbeat fer at halda konsert ólavsøkaftan 28. juli frá klokkan 17.00 til 24.00.

- Sostatt koma tiltøk, ið venda sær til einhvønn føroying, at koyra leypandi kring allan býin og alla tjóðarhøgtíðina, vísir Heðin Mortensen á.

### Ólavsøkan á hægri støði

Sjálva høvuðsendamálið við øllum hesum nýggju tiltøkunum, er at flyta ólavsøkuna oman aftur í miðbýin og at lyfta ólavsøkuna á eitt hægri stig.

- Vit vilja hava okkurt til allar føroyingar. Um tú ikki hevur hug at fylgja einum tiltaki, so fara vit nú alla tíðina at hava eitt alternativ, ið kanska hóskar betri til tann einstaka. Alt tað vanliga verður sum tað plagar. Ólavsøkuteltið og skjótibásarnir og alt tað verður enn uppi í Kommunuskúlagarðinum, og har kemur enn at verða nógv lív í alla tíðina. Ætlanin við hesum nýggju tiltøkunum er at flyta fokus oman í miðbýin og at geva øllum okkara gestum fleiri møguleikar. Vit vilja við hesum lyfta ólavsøkuna á eitt uppaftur hægri støði, staðfestir Heðin Mortensen at enda.

Av tí at ólavsøkan liggur soleiðs í ár, at ólavsøkuaftan er mánadag, er tað tískil gjørligt at skipa hana á henda hátt. Sostatt verður ólavsøkan drúgv í ár, og ivaleyst fer tað at taka nógvum fólkum drúgva tíð at koma fyri seg aftur eftir stóra hátíðarhaldið.